# b9 - Føroysk tænasta fyri danskar prísir

Benny Larsen í Hoyvík hevur arbeitt sum sjálvstøðugur timburmeistari í 25 ár. Fyri fýra árum síðani valdi hann tó at byrja eitt felag sum selur vindeygu og hurðar, og kallast b9.fo eftir manninum sjálvum, Benny.

b9.fo er eitt lítið firma, har Benny arbeiðir einsamallur. Hann hevur eitt stórt úrval av bæði vindeygum og hurðum, sum hann selur kring alt landið. Benny roynir eisini at hava kostnaðin so lágan sum møguligt, so kundin fær eina bíliga vøru. Hann selur vøruna fyri danskan fabrikspris her á landi. Tað vil siga, at kundin fær føroyska tænastu fyri danskan prís.

Benny Larsen selur úthurðar og vindeygu av øllum sløgum av træi, aluminium og plastikki. Harafturat selur hann vindeygu av slagnum træ/aluminium. Hetta merkir aluminium er á uttaru síðuni og træ er á innaru síðuni á vindeygunum. Plastikkvindeyguni koma frá Hvidbjerg og træ/alu koma frá Ideal Combi og aluminium frá HS Hansen í Danmark. b9 koyrir uppá konseptið hjá Ideal Kombi, sum er at útvikla og framleiða eitt stórt úrval av vindeygum og hurðum av høgum kvaliteti, sum eru av slagnum træ og kombinerað træ/ aluminium við 10 ára garanti.

Tænastan umfatar alt frá umbiðing og levering í Føroyum. Tó kann b9 eisini geva ta tænastu at seta hurðar ella vindeygu í, um kundin ynskir tað.

Um tit vilja hava fleiri upplýsingar um b9 og Benny Larsen, so kunnu tit vitja heimasíðuna sum er www.b9.fo



*Benny Larsen hevur fyritøkuna b9.fo. Hann selur úthurðar og vindeygu fyri danskan fabrikspris her á landi. Tað vil siga, at kundin fær føroyska tænastu fyri danskan prís*




















